effo deildin

FÓTBÓLTUR

ÍTRÓTTUR



VIT TIPPA

Tróndur Arge tippar...

1	x	2	
1	x	2	
1	X	2	
1	X	2	
Dysturin útsettur			

Fótbóltsserfrøðingarnir hjá Miðlahúsinum tippa umførini í Effodeildini

***1:** Heimasigur **X:** Javnleikur **2:** Útisigur*



Myndir: Álvur Haraldsen

hálva tíman, staðfestir væl nøgdi B36 venjarin Sámal Erik Hentze.

Tað hongur ramur gullroykur uppi í B36 ferðalagnum, sum sunnudagin fer til Fuglafirðar. Í Runavík vóru nógvir fjepparar saman við árstalsliðnum. Spælararar og venjarar siga, at hetta var avgerandi, tá ið tað stóð mest á, og tí kann roknast við, at stuðulin aftur verður stórur í Fuglafirði. Á pappírinum tykist hetta vera minni torfør avbjóðing, men hon er ikki minni týdningarmikil enn tann síðsta sunnudag.

Eftir fleiri lítið sannførandi avrik svaraði ÍF av álvara aftur ímóti AB. Clayton Soares avgjørdi beinanvegin, og hini úrslitini lagaðu tað soleiðis, at ÍF framvegis hevur møguleika at røkka europeiskari luttøku. Um tað skal eydnast, so er avbjóðingin at vinna fulla úrtøku ímóti B36.

Stórdystur verður í Gundadali

HB - Víkingur

SUNNUDAGIN KL. 15.00

Sunnudagin vann HB 2-0 pliktsigur á heimavølli ímóti Skála, sum fyri tað mesta vardi.

– Ímóti Víkingur verður talan um heilt aðra avbjóðing. 2. hálvleik ímóti Skála hugsaðu vit ikki frítt um næstu avbjóðingina, sum hevur sera stóran týdning, sigur HB venjarin Heðin Askham.

HB hevur framvegis møguleika at vinna FM heitið, sum teir undan kappingarbyrjan settu sær fyri at vinna. Tá settu teir sær eisini fyri at vinna steypakappingina. Tað málið rukku teir ikki. Mótstøðuliðið hesa ferð, Víkingur, streyk avstað við løgmanssteypinum.

Víkingur vann sunnudagin 3-1 í Streymnesi, og síðsta Víkinga tapið var 25. mai. Báðir landskappingardystirnir fyrr í ár millum HB og Víking endaðu við javnleiki.

– Tað eru framvegis tólv stig eftir at spæla um, og vit hava framvegis møguleika at røkka hægri upp enn triðja plássið, sum vit nú eru á. Vit spæla hvørja ferð fyri at vinna, og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur, sigur Víkinga liðformaðurin Atli Gregersen.

Røkka ella støkka á Toftum

B68 - AB

SUNNUDAGIN KL. 15.00

Sunnudagin vann B68 1-0 á heimavølli ímóti KÍ. Samstundis tapti AB 3-0 í Fuglafirði. Harvið eru tað seks stig frá B68, sum er niðanfyri strikuna, og fram til AB, sum er omanfyri strikuna.

– Vit fegnast um sigurin á KÍ og um, at tað framvegis er møguleiki fyri at sleppa undan niðurflyting. Vit vita, at møguleikin ikki er so stórur, men vit spæla av fullum huga fyri møguleikanum. Um vit vinna hesa ferð, so verður munurin trý stig, og so kann alt framvegis henda, sigur B68 venjarin Jógvan Martin Olsen.

Umframt innanhýsis uppgerðina á Svangaskarði millum B68 og AB hava hesi liðini hesar dystir eftir at spæla í ár: AB: HB (h), KÍ (ú) og Skála (h). B68: Skála (ú), B36 (h) og Víkingur (ú). B68 hevur verri málmun enn AB – sjey mál sum kunnu minka báðar vegir við møguligum sigri. Um B68 vinnur við til dømis tveimum málum, so verður málmunurin trý.

– Nú hava vit spælt fimm dystir uttan at vinna. Leikligu avrikini hava ikki verið nóg góð. Nú er dagsskráin at vinna ímóti B68. Hvussu spælið verður telur ikki mest nú. Tað snýr seg bara um at vinna, sigur AB málverjin Heðin Stenberg.

joannes@sosialurin.fo

Effodeildin støðan

effo deildin

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	B36	23	16	4	3	46	21	+25	52
2	HB	23	14	6	3	49	17	+32	48
3	Víkingur	23	11	9	3	48	24	+24	42
4	EB/Streymur	23	9	7	7	37	30	+7	34
5	NSÍ	23	9	4	10	45	37	+8	31
6	KÍ	23	8	6	9	33	33	0	30
7	ÍF	23	7	7	9	33	39	-6	28
8	AB	23	5	7	11	25	50	-25	22
9	B68	23	4	4	15	19	51	-32	16
10	Skála	23	2	6	15	13	46	-33	12

ÍF

Ikki við: Frank Poulsen (Skurðviðgjørdur, 3-4 vikur), Poul N. Mikkelsen (Lærkrikin, ógreitt hvussu leingi) og Fritleif í Lambanum (Leikbann 1 dyst)

KÍ

Ikki við: Bárður J. Heinesen (Leikbann 1 dyst eftir)

NSÍ

Dysturin útsettur

SKÁLA

Ikki við: Poul N. Poulsen (Slitið krossbandið), Jákup Jacobsen (Brotið østbeinið), Jákup Johansen (Leikbann, 1 dyst eftir), Teitur R. Joensen (Fluttur av landinum), Pætur Dam Jacobsen (Skaddur) og Høgni Midjord (Skaddur)
Við aftur: Edvin Jacobsen (Leikbann)

VÍKINGUR

Ikki við: Dánial Pauli Lervig (Skal undir skurð, úti restina av árinum)